## CIA kunnar um búskap

Tað er ikki vanligt, at ovastin fyri amerikonsku fregnartænastuni úttalar seg um búskaparviðurskifti, men tað gjørdi CIA-ovastin, Leon Panetta, á tíðindafundi fyrradagin. Hann segði, at Barrack Obama, forseti, fær dagliga kunning frá CIA um viðurskiftini í ymsum londum, og um nakað bendir á, at búskaparkreppan kann elva til ófrið har. Hann segði, at lond sum Argentina, Ekvador og Venesuela eru døm um lond, har búskaparliga kreppan kann elva til óstøðug politisk viðurskifti, sum hann orðaði tað. Hann nevndi eisini Russland og Kina í sama viðfangi.



## Kunnu aftur síggja kistur

Amerikanska verjumálaráðið, Pentagon, hevur gjørt av at slaka eitt sindur í reglunum um, at fjølmiðlar skulu ikki taka myndir av flaggskrýddum kistum við amerikonskum hermonnum, sum hava latið lív uttanlands. Forboðið hevur verið í gildi síðani 1991, men nú hevur Robert Gates, verjumálaráðharri, gjørt av, at fjølmiðlarnir mkunnu vísa myndir av kistunum, um avvarðandi hjá teimum deyðu hermonnunum hava góðtikið tað. Sambært Pentagon hava 4.252 amerikanskir hermenn latið lív í Irak síðani mars í 2003, og 584 eru falnir í Afghanistan síðani síðst í 2001.

# Landsstýrið fer at hækka partapeningin í Fiskaaling



*- Fiskiskapur hevur ongan møguleika at nøkta tørvin á fiskamati í framtíðini, og tí er aling svarið upp á henda alsamt veksandi eftirspurning, segði Jacob Vestergaard, tá hann setti aliráðstevnuna í morgun*




*Hans Jakku Mikkelsen, søluleiðari hjá Marine Harvest, greiddi í morgun frá framleiðslu-og marknaðarútlitum í føroysku og útlendsku alivinnuni*



*Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag, Ragnar Joensen, sat djúpt í stólinum í morgun og lýddi á góðu útlitini í føroysku alivinnuni*

**Málið, sum politiski myndugleikin sær fyri sær, er, at Føroyar skulu gerast millum fremstu ali- og matvøruframleiðslutjóðir í heiminum, tá ræður um dygd og avkast.**
**- Føroysku alararnir hava veruliga lagt seg í selarnar at gerast heimsins bestu alarar, segði Jacob Vestergaard, tá hann setti aliráðstevnuna í morgun**

ALIRÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Vilmund Jacobsen*

Rættiliga nógv fólk var til setanina av aliráðstevnuni á Hotel Føroyum í morgun, sum Føroya Havbúnaðarfelag og Vinnuhúsið skipa fyri.

Tað var Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sum setti stevnuna klokkan 9.30. Sambært skránni skuldi Jóhan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, seta stevnuna, men hann er uttanlands í løtuni.

- Sum eg havi skilt, hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum sett sær fyri serliga at arbeiða við nøkrum fáum satsingarøkjum, eitt nú alivinnuni.

### Aling er svarið

Jacob Vestergaard nam í síni setanarrøðu við veksandi eftirspurningin eftir fiski.

- FAO, sum er matvørustovnurin undir ST, hevur sagt, at eftirspurningurin eftir fiski í ár 2030 verður umleið 37 miljónir tons størri enn í dag.

Hann vísti á, at vanligur fiskiskapur ongan møguleika hevur at nøkta henda tørv, og tí er aling av fiski svarið upp á henda alsamt veksandi eftirspurning eftir fiski.

Jacob Vestergaard segði, at føroyska alivinnan hevur havt ein markantan vøkstur í útflutningi av alifiski síðan kreppuna.

- Útflutningsvirði nærkaðist soleiðis einari miljard krónum í 2008, legði hann aftrat.

### Stór menning

- Alivinnan hevur sum heild ment seg sera nógv seinastu árini, og talan er soleiðis um eina vinnu í stórari framgongd, har ognarviðurskifti, støðd, framleiðslutøkni, staðsetingar og rakstrarhættir eru í støðugari broyting.

Landsstýrismaðurin segði, at málið, sum politiski myndugleikin sær fyri sær, er, at Føroyar skulu gerast millum fremstu ali- og matvøruframleiðslutjóðir í heiminum, tá ræður um dygd og avkast.

Hann segði, at føroysku alararnir veruliga hava lagt seg í selarnar at gerast heimsins bestu alarar.

- Samstarvið millum myndugleikar og vinnuna er eisini fyrimyndarliga gott, og sæst hetta millum annað í tí einstandandi skipan, sum vinnan og Heilsufrøðiliga Starvsstovan hava bygt upp í felag

Jacob Vestergaard vísti á, at við hesi skipan ber til at fylgjaymiskumparametrum og á henda hátt fylgja við, hvussu støða og framleiðsla eru.

### Fiskaaling granskar

- Strategiin, sum ætlanin er at fylgja fyri at røkka hesum málum, er, at vinnugransking, innovatión, vørumenning og marknaðarføring eins og marknaðaratgongd verða raðfest í størri mun enn nú. Eisini skulu karmarnir fyri vinnuliga virksemið støðugt dagførast.

Landsstýrismaðurin vísti á, at eitt týðandi amboð hjá tí almenna í sambandi við menningin av alivinnuni er partafelagið Fiskaaling.

- Uppgávur felagsins vóru frá byrjan at menna framleiðslumannagongdir og at kanna, hvørjir møguleikar vóru fyri lønandi aling í Føroyum. Nú leggur felagið størri áherðslu á granskingar- og menningarvirksemi innan alivinnuna í Føroyum.

Jacob Vestergaard vísti á, at samstundis, sum størri og størri dentur verður lagdur á gransking, er støða tikin til at gevast við steðga við kynbótararbeiðnum við laksi, tí rognini fyri ein stóran part verða innflutt, og tí raksturin ikki er lønandi.

- Fiskaaling hevur sett og ynskir at seta fleiri granskarar fyri at víðka um granskingar- og royndarvirksemi.

### Styrkja Fiskaaling

Landsstýrismaðurin segði, at Fiskaaling hevur sett sær nágreinilig mál og lagt strategi fyri, hvussu málini verða rokkin.

- Ætlanin er at stuðla uppundir hesa tilgongd, og lógaruppskot er gjørt um at hækka partapeningin í felagnum við fænum, sum er í Endurgjaldsgrunni Alivinnuna.

Jacob Vestergaard visti í síni setanarrøðu eisini at siga, at uppskot til nýggja alilóg er á veg í tingið.

- Endamálið við hesi lóg er at geva vinnuni greiðari og smidligari karmar at virka undir.

Landsstýrismaðurin helt annars, at evnini, sum Føroya Havbúnaðarfelag og Vinnuhúsið hava valt at taka upp á ráðstevnuni, eru væl vald og týðandi fyri vinnuna.